

*Jákup á Borg heldur tað vera long bíðitíð, nú HB ikki skal spæla dyst í tvær vikur*
*Mynd: Ávlur Haraldsen*

# Ikki nóg gott

Tað var ein bólkur av vónbrotnum HB-spælarum, sum eftir dystin stundaði inn í skiftingarrúmini við Mølina. Vónbrotnir av tapinum, men einamest vónbrotnir av leikliga avrikinum, sum avgjørt ikki gav ábendingar um, at talan var um eitt lið, sum ætlar sær at spæla fyri meistaraheitinum. Eitt skoðsmál, sum Jákup á Borg ikki var heilt ósamdur í.

- Í øllum førum ikki, um vit hyggja at seinna hálvleiki. Fyri steðgin haldi eg, at vit høvdu so nøkun lunda fatur á teimum, men tað helt bara ikki í longdini.

Tað sær eisini út til, at tit hava sera ilt við at fáa breidd í spælið, og at talan tí einamest verður um planleyst uppspæl, sum endar beint í sterku miðverjuni hjá EB/Streymi?

- Tað er rætt, men tað er eisini trupult at fáa breidd í spælið her. Vøllurin er somikið smalur, at tað illa letur seg gera. Men tað var nú ikki størsta orsøkin. Eg haldi, at EB/Streymur skal hava rós fyri sítt avrik, har teir seta okkum undir trýst.

### Mugu gera okkara

Komandi vikuskifti er fótbóltslandsliðið í gongd, og tað vil siga, at í HB hava tey 14 dagar at sleikja sárini, áðrenn farið verður undir næstu uppgávuna. Spurdur, hvørt hetta var ein fyrimunur ella vansi, helt Jákup heilt avgjørt, at talan var um ein vansa.

- Tvær vikur er øgiliga leingi at bíða. Sluppu vit at velja, so vildu vit helst heldur enn gjarna spælt longu í morgin, soleiðis at hetta avrikið kundi verið vaskað burtur, helt hann.

At enda spurdu vit Jákup, hvørt hann nú heldur, at teirra leiklutur í gullstríðnum er av. Ella um vitjanirnar hjá bæði Skála og B36 á Eiði kunnu geva HB eina vón.

- Tað er so eingin, sum hevur vunnið her enn, so sjálvandi vóna vit, at hini eisini missa stig. Men fyrst og fremst, so skulu vit sjálvir taka okkum saman. Vit skulu í øllum førum vísa nakað nógv meira, enn vit gjørdu í dag, um vit skulu hava nakran møguleika at vinna gull, staðfesti hann.

# Stóra hetjan

Tá hann varð skiftur út 10 minuttir fyri leiklok, var fagnaðurin øgiligur kring vøllin. Við einum reinum hat-trick var Sorin Anghel meira enn nakar annar ímyndin av stórtapinum, sum HB fekk oman yvir seg á Eiðinum, og tí er einki at siga til, at talan var um ein fegnan spælara, sum vit hittu eftir dystin.

- Sjálvandi er tað deiligt, at vit vinna so nógv. Vit eru tó ikki nóg konsentreraðir fyrsta hálva tíman, men vit blíva við, og vit fáa alla tíðina møguleikar. Og tá vit so eisini byrja at skora, so megna vit at avgera dystin. Tað er annars ein trupulleiki, sum hevur kostað okkum nógv á heimavølli, har vit hava spælt alt ov nógvar javnleikir, helt hann.



*Við fimm málum í teimum báðum seinastu dystunum, er Sorin Anghel av álvara farin at klintra upp eftir máltindunum*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

Um sjálvan dystin og uppleggið hjá EB/Streymi, helt hann, at her hevði tað mesta riggað eftir ætlan.

- Vit tosaðu nógv um tað áðrenn dystin, at móti HB, so nyttar tað ikki bara at spæla langar bóltar. Vit vistu, at vit máttu halda bóltinum á jørðini, og tað eydnaðist fyri tað nógva. Og so stríðast vit alla tíðina sera væl fyri hvørjum øðrum.

### Droymir um Europa

Avrikið hesaferð og málini, sum Sorin nú av álvara hevur funnið, gera tað kanska ikki heilt vónleyst hjá EB/Streymi at droyma europeiskar dreymar. Og hóast hann ásannaði, at tað enn er nakað eftir til hetta málið, so staðfestir Sorin, at tað er eitt av avgjørdu málum hansara.

- Tað hevur verið mín dreymur, síðani eg kom til Eiðis. At spæla Europa-Cup dystir við EB/Streymi. Og skal eg vera púrasta erligur, so rokni eg eisini við, at gerst veruleiki, um vit megna at halda fast um fólkið á liðnum. Her eru ein rúgva av evnaríkum spælarum, sum als ikki hava toppað enn. Kunnu vit halda liðnum saman í eini tvey ár afturat, so ivist eg ikki í, at vit kunnu stríðast heilt frammi í oddinum, staðfesti rumenski framherjin at enda.

# Misjøvn úrslit í NM

**Heini Olsen og Hans Kristian Simonsen umboða Føroyar í norðurlandameistaraskapinum, sum verður telvdur í Vammala, Finnlandi. Fimm umfør av ellivu eru leikt.**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Kappingin um at gerast norðurlandameistari í ár hevur av øllum at døma ikki serligan status hjá sterkastu norðurlendsku stórmeistarunum, tíverri. Í 2003, tá NM seinast varð leikt, var kappingin munandi sterkari. Flóvin Tór Næs fekk tá kaldar vøttir at kenna, tá hann hitti telvarar sum Curt Hansen, Hannes H. Stefanson, Einar Gausel, Lars Schandorff og aðrar stórmeistarar.

Sviar eru best umboðaðir í ár við stórmeistarunum Evgeny Agrest (2592) og Tiger Hillarp-Persson (2511). Finnlendingar hava sent ein stórmeistara og ein altjóða meistarar, meðan íslendarar, noregsmenn og danir óskiljandi ikki hava kunnað lokkað nakran stórmeistara til kappingina. Serliga veikir á pappírinum eru norsku umboðini. Okkara umboð eru væl sterkari enn teir.

Einans tríggir av teimum tólv luttakarunum eru stórmeistarar. Fýra telvarar eru altjóða meistarar.

### Favorittar í oddinum

Tá ratingmunurin frá teimum sterkastu til teir veikastu er so stórur, er tað heldur ikki óvæntað, at Agrest og sterki danski altjóða meistarin, Nicolaj V. Pedersen (2488), eru fremstir við Tiger beint í hølunum. Nicolaj hevur tveir stórmeistaranormar og hevur fleiri ferðir verið hálvt stig frá sínum triðja og tittulgevandi normi.

Hóast heldur svingandi telving fyrstu umførini, fekk Heini Olsen eina framúr kappingarbyrjan við javnleiki og tveimum sigrum. Hann útnyttaði til fulnar feilir hjá mótstøðumonnum sínum í øðrum og triðja umfari og undan talvinum móti IM Sammalvuo blandaði Heini seg veruliga í oddin. Men tap í hesum talvi, umframt tapið ímóti GM Nybäck í fimta umfari sunnudagin, førir við sær, at Heini hevur hálvttriðja stig.

### Kann bert ganga betur

Hans Kristian Simonsen er einsamallur aftastur við ongum stigi. Fimm tap á rað eiga at svíða. Úrslitið minnir ikki sørt um 1st Klaksvík International í 2002, tá kollfirðingurin tapti fleiri talv á rað og endaði loksins við hálvum stigi av níggju møguligum. Seks talv eru eftir at leika og Hans Kristian kann ugga seg við, at hann longu hevur hitt allar stórmeistararnar, umframt Nicolaj V. Pedersen.

Í roynd veru hevur Hans Kristian telvað væl, men hevur síðani knappliga gjørt avgerandi stórir feilir, sum sterku mótstøðumennirnir sjálvandi hava gjørt sær dælt av. Sitatið: "One bad move nullifies forty good ones" hjá gamla talvmeistaranum frá fyrru helvt av 20. øld, Horowitz, rennur einum í huga tá ein hyggur at talvunum hjá Hans Kristiani fyrstu fimm umførini.

Mánadagin eftir evstamark hittust Heini og Hans Kristian í sætta umfari. Vónandi leypa teir í væðið og telvað manniliga, hóast ein skjótur javnleikur er teimum freistandi og kærkomin eftir tvey tap á rað í part.

### Støðan eftir 5. umfar:

| | | |
|---|---|---|
| 1-2 | GM Evgeny Agrest (S) | 4,5 |
| 1-2 | IM Nicolai V. Pedersen (DK) | 4,5 |
| 3 | GM Tiger H. Persson (S) | 4,0 |
| 4 | GM Tomi Nybäk (F) | 3,0 |
| 5-8 | Heini Olsen (Føroyar) | 2,5 |
| 5-8 | Stig Tjomsland (N) | 2,5 |
| 5-8 | Espen Lie (N) | 2,5 |
| 5-8 | IM Tapani Sammalvuo (F) | 2,5 |
| 9-10 | IM Heikki Lehtinen (F) | 1,5 |
| 9-10 | IM Bragi Thorfinnsson (Í) | 1,5 |
| 11 | Robert Hardarsson (Í) | 1,0 |
| 12 | Hans K. Simonsen (Føroyar) | 0,0 |

# 4th Klaksvík International

Síðani 2002 hevur Rani Nolsøe skipað fyri altjóða kappingum í norðoyggjum. Tann fyrsta varð telvað í góðum umstøðum á Hotel Norð á Viðareiði, har telvararnir eisini búðu. Síðani hava tvær kappingar verið í Klaksvík og tann fjórða verður helst eisini telvað í fiskivinnuhøvuðstaði Føroya. Kappingin verður leikt í seinnu helvt av septembur.

Seks telvarar skulu, eins og í fjør, telva dupultumfar. Útlendingarnir verða hesir, úr ávíkavist Svøriki, Norra og Danmørk: IM Johan Ericsson (2423), FM Eirik Gullaksen (2382) og IM Jens Ove Fries Nielsen (2381), ið vann 3th Klaksvík International.

Heini Olsen, Hans Kristian Simonsen og Helgi Dam Ziska verða føroyingarnir, sum á hesum sinni sleppa at royna seg. Bæði Helgi og Hans Kristian hava feskar normar við sær til Klaksvíkar. Heini vann sær sín fyrsta og higartil einasta norm í kapping í Norra í 2004 og fleiri ferðir hevur hann verið hálvt stig frá normi.

Útrokningar siga okkum, at Heini og Hans Kristian skulu hava 7 stig av 10 møguligum fyri at vinna sær ein norm, meðan Helgi skal hava 6,5 stig.

**-cens**